VIÐTØKUR FYRI VÁGS SÓKNAR BYGDASAVN

1.

Felagið Vágs sóknar fornminnisfelag setir bygdasavnið á stovn.

2.

Endamál savnsins er:

1. at savna, skráseta, varðveita og vísa fram lutir, sum hava siðsøguligan áhuga og savna frásagnir um nýtslu og søgu teirra.

2. at vekja ans fyri fornminnum í sóknini og innsavningarvirksemi í hesum sambandi og fyri varðveiting av gomlum bygningum og umhvørvi við siðsøguligum virði.

3.

Savnið verður stjórnað av eini 5 mannanevnd, 4 valdir av aðalfundinum í Vágs sóknar fornminnisfelags og 1 valdur av Vágs býráð.
Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og kassameistara.
Nevndin hevur ábyrgdina av dagliga starvinum og stendur aðalfundinum í Vágs sóknar fornminnisfelag til svars fyri ognum og rakstri felagsins.

4.

Rakstrarætlan verður løgd fyri landsantikvarin til góðkenningar. Roknskaparárið er álmanakkaárið. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna.

5.

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram efir grein 3, 3. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972, við seinni broytingum, um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

6.

Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar av Vágs sóknar fornminnsifelag og góðkendar av Vágs býráði, landsantikvarinum og landstýrinum. Tær broytingar, sum verða gjørdar í viðtøkunum skulu somuleiðis góðkennast av Vágs býráði, landsantikvarinum og landsstýrinum.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi í Vágs sóknar fornminnisfelag tann: 29/9 1994

Váttað:

I. Mortensen
K. Mortensen
B. Mortensen
[illegible]
[illegible]

Á fundi í Vágs býráð tann 7. september 1994 vóru viðtøkur fyri Vágs Sóknar Bygdasavn til viðgerar.

Býráðið samtykti á fundinum at góðkenna viðtøkurnar.

B.v.

Jógvan Krosslá
býráðsformaður

Góðkendar

FØROYA LANDSSTÝRI, 12. juli 1995

landsstýrismaður

/ Jákup Mikkelsen